# »Can we hear t

**Hann hevur ongantíð verið í Føroyum, men eftir fýra dagar saman við føroysku áskoðar-unum, er Paul John-son púrasta vekk í oyggjum okkara. Ikki minst flogbóltinum og kvinnunum**

FJEPPARI/HEPPARI
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** - Hvat vilt tú hava meg at siga. Eg eri ikki vanur við at tosa við bløð, so eg veit ikki, hvussu tað gongur fyri seg. Faktiskt sigi eg altíð nei til blaðsamrøður, men eftir sum tú kemur frá einum føroyskum blað, so geri eg eitt undantak hesaferð. Føroyingar eru eitt fantastiskt fólkaslag kann eg alt fyri eitt heilsa til allar lesararnar hjá tykkum.

Orðini fellu sum skotriðil úr eini maskinbyrsu, tá hallarvarparin til flogbóltsdystirnar á oyggjaleikunum tosar. Paul Johnson er navnið á manninum, sum stútt og støðugt fær áskoðararnar at bæði rópa og klappa, meðan dystirnir eru. Aldurnar verða sendar bæði ein og annan veg, og ikki minst kemur ferð á, tá sjónvarpið sendir beinleiðis úr dystum. Alt í alt er er einki at ivast í, at hann hevur imponera flestu føroyingarnar í Lerwick eins nógv, sum føroyingar hava imponerað hann.

### Ein fantastisk ítrótt

Vanliga spælir Paul í einum rock-orkestri her í Hetlandi, og tí sigur hann seg ikki hava nakrar trupulleikar við at heppa á áskoðararnar.

- Eg spæli í einum slag av rock-orkestri. Og tað, sum eg eri kendur fyri, er at fáa fjøldina við. Og tað passar sera væl inn í umhvørvið her. Ikki minst hjá føroyingunum, sum tykjast vilja hava ein slíkan at heppa saman við teimum. Tað ger eisini mítt arbeiði lættari.

Men hevur tú nakran tíð roynt tað til ein flogbóltsdyst fyrr? Tað er jú ikki tann ítróttargreinin, sum hetlendingar gera mest við.

- Nei. Eg hevði ikki so mikið sum hugt at einum flogbóltsdysti, fyrr enn leikirnir byrjaðu. Men tað er fantastiskur ítróttur. At síggja støði á spælinum og ikki minst fimleikan í kropsrørslunum hjá tykkara spælarum er ótrúligt. Og ikki minst hjá kvinnunum. Tær eru ótrúligar, og eg vil sjálvur siga, at eg eri maskotturin hjá teimum.

- Men eisini menninir eru framúr. Hasin har Rúni Weihe, og nummar fimm og tíggju (Jón og Bartal, blðm.). Teir vita pína doy, hvat flogbóltur er fyri nakað. Undan dystinum í gjár móti Álandi søgdu teir mær, at teir gleddu seg til ein dyst, har teir fingu veruliga mótstøðu. Og tað fingu teir eisini. Tað var ein fantastiskur dystur, har menninir veruliga togaðu seg eitt stig uppeftir.

*Og gleðir tú eins nógv til finaludystirnar, sum vit føroyingar gera?*

- Tað geri eg. Nú vóni eg bara, at menninir eisini koma hartil, men tað gera teir heilt víst. Og eg ivist ikki í, at tær báðar finalurnar fara at geva okkum nakrar fantastiskar dystir. (Eftir at samrøðan varð gjørd, kundu vit so tíverri staðfestas, at hetta ikki hendi, blðm.)

- Og sum heild haldi eg, at dystirnir her á leikunum longu nú hava givið hetlendskum flogbólti eitt orðans skump. Fólk hava sæð nakrar framúrskarandi dystir frá tykkara síðu. Kvinnurnar vóru sera sterkar í hálvfinaluni, og yvir høvur haldi eg, at øll hava havt »a great time« higartil. Eg havi havt tað





So er klárt til finaluna. Hósdagin eftir evstamark okkara skuldu føroysku kvinnurnar enn einaferð spæla finaludyst móti Saaremaa. Og so er spurningurin, hvørt tað fjórðu leikirnar á rað kann gerast um føroyskt gull

Føroyar-Jersey 3-0 (25-10, 25-17, 25-16)

## Upphiting fyri víðarikomin

**Uttan stórvegis hóva-sták prógvaðu flog-bóltskvinnurnar enn einaferð, at tað bara verður í finaludystin-um, at tær fáa veruliga mótstøðu**

FLOGBÓLTUR
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Føroysku flogbóltskvinnurnar hava spakuliga fingið status sum veruligir áskoðaramagnetar á ítróttardeplinum við Hickimin í Lerwick. Soleiðis var talan aftur hesa ferð um fullsett áskoðarapláss, tá hálvfinaludysturin móti Jersey var á skránni.

Flogbóltur er ikki tann ítróttargreinin, sum vekir størsta ansin á teimum bretsku oyggjunum, og tó at Jersey hevur víst seg sum tann sterkasta av hesum, so var talan sjáldan um veruliga mótstøðu.

### Allar við á vøllinum

Longu fyrstu bóltarnar av fyrsta settinum vóru tekin í bæði sól og mána um, hvønn vegin tað skuldi fara. Føroysku kvinnurnar løgdu hart út. Helen, Gudrid og Herborg skifust um at bómba bóltarnar upp um netið og niður í gólvið, og einasti møguleikin hjá Jersey at fáa stig tóktist vera, tá okkara gjørdu mistøk.

Eins og flestu av undanfarnu dystunum, so vórðu nógvar útskiftingar støðugt framdar í dystinum. Sjálvandi kann hetta merkja nakað fyri rútmuna í spælinum, sum kann gerast trupul at halda. Og sjálvandi kann tað merkjast á liðnum, tá sterkastu profilarnir verða tiknar út eina løtu. Men tað er einki at ivast í, at føroyska liðið eisini er sera sterkt á beinkinum. Og tað at allar fáa spælitíð er uttan iva bæði ein sosialur og ítróttarligur fyrimunur. Serstakliga, um tað í finaluni kann gerast neyðugt við útskiftingum, tá spælarar skulu hava luft, ella um kinkur kemur í spælið hjá okkum.

Hetta seinna hava vit so ikki upplivað enn, men soleiðis sum dystirnir móti Saaremaa plaga at vera, er einki at ivast í, at hetta fer at koma. Og tá verður spurningurin, hvørt okkara hava mentalu og leikligu styrkina til at halda fast um gullmerkini, sum tríggjar leikir á rað eru endað hjá okkum.